Frank Jensen, fyrrv. danskur løgmálaráðharri:

# Fullveldið hevði breiðkað gjónna millum rík og fátæk í Føroyum



*Undir samráðingunum um yvirtøku av løgregluni í Føroyum í 2000 varnaðist eitt av donsku embætisfólkunum, at føroyska sendinevndin nýtir ein bandupptakara undir borðinum fyri at fáa samráðingarnar festar á band. Hetta skapti mikla øsing, tí tað var greitt avtalað frammanundan, at eingin bandupptakari skuldi nýtast, sigur Frank Jensen, fyrrverandi danskur ráðharri*

**Loysingin hevði neyvan ávirkað politikkararnar og fólkið í Havn, men vit hugsaðu um, hvørjar avleiðingar loysingin fór at fáa fyri føroyingar á bygd, tá fullveldissamráðingarnar vóru í hæddini, sigur Frank Jensen. Nú viðurskiftini millum Føroyar og Danmark eru komin í fasta legu, heystar Fogh tað, sum Nyrup sáddi undir samráðingunum, heldur fyrrverandi danski løgmálaráðharrin**

POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Aalborg:** Nú klárar hann ikki at halda sær longur. Stóran part av leiðini úr Vejle Idræts Hus hevur staðið nógv á honum, og komin á hotellkamarið er loksins friður frá ágangandi fjølmiðlafólki. Ungi og evnaríki politikarin úr Aalborg, 31 ára gamli Frank Jensen, brestur út í grát og hálsfevnir sína stóru politisku fyrimynd, Svend Auken.

Hann hevði stríðst væl og manniliga fyri at hjálpa Auken. Fyri góðum tíma síðan hevur hann hildið viðmælisrøðu fyri Svend Auken, men sama gjørdi. Úrslitið var greitt frammanundan. Sitandi formaðurin og stóra fyrimyndin hjá honum, Svend Auken, mátti lúta fyri avbjóðaranum úr Esbjerg, Poul Nyrup Rasmussen.

Soleiðis greiðir rithøvundurin Bettina Heltberg frá í bók síni, Hvor der handles, um formansstríðið í Danska Javnaðarflokkinum á vári1992, tá Poul Nyrup Rasmussen framdi sonevnda kongamorðið á sitandi formannin, Svend Auken.

Hóast sín almenna stuðul til mótstøðumannin hjá nýggja formanninum í danska Javnaðarflokkinum, sær Poul Nyrup Rasmussen kortini okkurt í unga politikaranum, Frank Jensen. Nærum øll átta árini, sum Nyrup Rasmussen situr við valdinum í Danmark, er evnaríki politikarin úr Norðurjútlandi týðandi limur stjórnunum hjá Poul Nyrup Rasmussen.

Júst tíðarskeiðið, tá Nyrup Rasmussen ræður fyri borgum, fer uttan iva í søguna sum eitt tað mest baldruta tíðarskeiðið í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Stórur partur av nítiárunum varð merktur av køldum misáliti millum partarnar. Serliga bankamálið og gróthørðu fullveldissamráðingarnar lýsa stundum kensluleysu støðuna, sum valdaðu millum partarnar í ríkisfelagsskapinum hesi árini.

Sosialurin hitti miðskeiðis í desember mánaði ein av týðandi monnunum hesi árini, fyrrverandi løgmálaráðharran Frank Jensen, í hugnaliga heimi hansara til eitt prát um hetta tíðarskeiðið, sum fekk mangan dana og føroying at ilskast.

### Samráðingarnar

- Ongin av teimum fýra fundunum á Christiansborg í 2000 vóru serliga tespiligir at vera á. Hýrurin undir samráðingunum var alt annað enn góður. Heldur enn at hava ein konstruktivan dialog vóru samráðingarnar merktar av óneyðugari illgiting millum partarnar. Vit kundu ikki byrja fundirnar, áðrenn krav um time-out var á skránni. Spenta støðan gjørdist ikki betri av, at fjølmiðlarnir í heilum vóru drignir inn miðskeiðis undir samráðingunum, hóast greið avtala var um hetta undan samráðingunum.

Frank Jensen sigur seg hava alt annað enn góð minni frá fullveldissamráðingum millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri í 2000. Saman við Poul Nyrup Rasmussen, Mogens Lykketoft, Marianne Jelved og Niels Helveg Petersen var Frank Jensen við í fyrireikingararbeiðnum undan fullveldissamráðingunum. Hóast ynskið úr Føroyum um fullveldi, var støðan hjá dønum greið: Teir vildu varðveita ríkisfelagsskapin.

Hóast drúgt fyrireikingararbeiðið var gjørt á embætismannastigi í Føroyum, var danska stjórnin hvørki at høgga ella stinga í. Føroyska samráðingarnevndin fekk greitt at vita, at ynsktu teir fullveldi, varð ríkisveitingin skorin eftir fýra árum. Hetta koma at svíða hjá føroysku samráðingarnevndini.

Við blokkniðurskurðinum eftir fýra árum hevði føroyska sendinevndin lítið og einki at samráðast um, og tað er neyvan ov nógv sagt, at júst blokkniðurskurðurin tók luftina úr føroysku sendinevndini.

- Ætlaðu føroyingar út úr ríkisfelagsskapinum, máttu teir fáa skriftina á veggin: Blokkstuðulin skuldi hvørva eftir fýra árum, og føroyingar skuldu haraftrat missa øll síni rættindi sum danskir ríkisborgarar í Danmark. Hóast hetta óivað var sum at fáa ein frammaná hjá føroyingum, haldi eg framvegis, at okkara mótspæl var skilagott og rætt, heldur Frank Jensen.

Spurdur, um danir á øðrum økjum áttu at borið seg øðrvísi at undir samráðingunum í 2000, svarar Frank Jensen:

- Tað er altíð lætt at líta aftureftir og siga, hvat tú skuldi gjørt øðrvísi. Eg eri kortini sannførdur um, at vit kundu verið allar illgitingar fyriuttan og rokkið endaliga úrslitinum nógv skjótari, enn vit gjørdu. Hóast tíðarandin greitt ikki talaði fyri hesari loysn, so haldi eg í dag, at vit- danir- møguliga áttu at verið meira virknir og komið við loysnum sjálvir, sum báðir partarn kundu tikið undir við. Hetta hevði møguliga havt við sær, at vit høvdu sloppið undan hasum strævna tíðarskeiðnum, sigur Frank Jensen.

### Kallsberg vs Hoydal

Frank Jensen sigur seg minnast væl, at støðan innanhýsis í føroysku samráðingarnevndini var spent. Sambært fyrrverandi løgmálaráðharranum var lætt hjá donsku sendinevndini undir trýsti frá Tjóðveldisflokkinum. Anfinn Kallsberg var nógv meira pragmatiskur, enn hann lætst, tí hann var jú noyddur at fyrihalda seg til samgongusamstarvið við Tjóðveldisflokkin. Úrslitið av hesum trýsti frá Tjóðveldisflokkinum gjørdist eisini, at samráðingarnar gjørdust til ein óneyðugan samanbrest heldur enn konstruktivan dialog, greiðir hann frá.

Tað átti at verið funnin fressur hjá donsku sendinevndini at gjørt sær dælt við Nyrup, Lykketoft, Jelved, Helveg-Petersen og honum sjálvum at síggja, at Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg ikki drógu eina línu.

- Tað var týðiligt undir samráðingunum, at Anfinn Kallsberg kendi seg noyddan at hóreiggja sær, tí hann var av ósemjuni millum Hoydal og Kallsberg, men hesum afturvísir Frank Jensen staðiliga, at danir gjørdu.

- Vit hugsaðu ikki um spreingja føroysku samráðingarnevndina. Tað týdningarmesta hjá okkum var, at einki varð fjalt undir samráðingunum. Valdu føroyingar fullveldi, mátti tað fáa avleiðingar. Vit kundu ikki í kjalarvørrinum av einum sterkum føroyskum fullveldisráki, har allar inntøkurnar vóru í topp, leypa upp á føroyska fullveldisvognin, tí vit vóru fullgreiðir yvir, at tað fór at fáa stórar fíggjarligar avleiðingar fyri føroyska samfelagið, og hendan veruleika máttu vit halda okkum til, fortelur hann.

> *- Hýrurin undir samráðingunum var alt annað enn góður. Heldur enn at hava ein konstruktivan dialog vóru samráðingarnar merktar av óneyðugari illgiting millum partarnar. Vit kundu ikki byrja fundirnar, áðrenn krav um time-out var á skránni. Spenta støðan gjørdist ikki betri av, at fjølmiðlarnir í heilum vóru drignir inn miðskeiðis undir samráðingunum*

## FAKTA

**Navn:** Frank Jensen
**Føddur:** 28 mai 1961
**Bústaður:** Aalborg
**Útbúgving:** Cand.oecon., Aalborg Universitet 1986. Hf-eksamen, Aalborg Katedralskole 1980
**Politisk karriera:** Løgmálaráðharri 30. des. 1996 - 27. nov. 2001. Granskingarráðharri 27. sept. 1994 - 30. des. 1996.

Limur í Folketingets Finansudvalg 1992-1994. Limur Udenrigspolitisk Nævn 2002. Limur í Fælleskommissionen for selvstyre i Grønland 2004. Limur í Udvalget vedrørende Grønlandske Forhold. Limur í 21-mands-udvalget for Færøerne. Varamaður í Europaudvalget 2001. Politiskur ordførðari til 1994 og aftur 2002-2005.

Uppstillaður fyri Javnaðarflokkin í Aalborg Nordkredsen frá 1987.